# 11 Fylgiskjal III: Spurnablað til stovnar

| **Stovnur:**<br><br>**Stovnsnummar:** | **Stovnsleiðari og nr.:**<br><br>**Høvuðskonta:** |
|---|---|

J.nr.: GL ___________

| **1 Um stovnin** | **Ja** | **Nei** | **Ó**[1] | **Viðmerkingar** |
|---|---|---|---|---|
| Eru endamál, virksemi og uppgávur stovnsins orðað og lýst. | | | | |
| Hevur stovnurin skrásetingar, sum í nøgd og góðsku kunnu lýsa: | | | | |
| • hvat stovnurin avrikar, | | | | |
| • hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar (t.d. tíðarnýtsla hjá starvsfólki). | | | | |
| Hevur stovnurin innanvirkis roknskap e.t., ið liðar útreiðslurnar út á tað, sum stovnurin avrikar. | | | | |
| **2 Roknskaparviðurskifti o.a.** | | | | |
| Hevur stovnurin eina roknskaparreglugerð, sum er góðkend av hægri myndugleika. | | | | |
| Er roknskaparreglugerðin: | | | | |
| • formliga skipað innan karmarnar av roknskaparrundskrivinum, og eru øll týðandi øki hóskandi lýst, | | | | |
| • dagførd. | | | | |
| Verða mánaðarroknskapirnir regluliga og rættstundis góðkendir mótvegis hægri myndugleika | | | | |
| Hevur stovnurin journalskipan, | | | | |
| um ja, hevur stovnurin skrivligar mannagongdir um journalisering. | | | | |
| Hevur stovnurin dagført yvirlit yvir ognir sínar. | | | | |

[1] Óviðkomandi spurningur

| 3 Um upplýsingar og KT-viðurskifti | Ja | Nei | Ó | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| **3.1 Týdningur og samband við onnur** | | | | |
| Hevur stovnurin upplýsingar, dátugrunnar, skjøl e.a., sum hava stóran týdning fyri: | | | | |
| • endamál/virksemi stovnsins, | | | | |
| • aðrar stovnar, | | | | |
| • samfelagið sum heild. | | | | |
| Viðger/skrásetir stovnurin persónsupplýsingar. | | | | |
| Hava teldurnar samband við alnetið. | | | | |
| Hevur stovnurin egnar búskaparskipanir, t.d. egna kassaskipan, lønarskipan, útrokningarskipan o.a., útgjaldsskipanir o.t. | | | | |
| **3.2 Trygdartiltøk** | | | | |
| Hevur leiðslan skipað hesi trygdartiltøk: | | | | |
| • brandmúr (Firewall), | | | | |
| • virusverju, | | | | |
| • trygdaravrit (Back-up), | | | | |
| • persónligt brúkaranavn, umframt loyniorð, ið javnan verður broytt, | | | | |
| • læsist skíggin sjálvvirkandi eftir t.d. 15 min, | | | | |
| • skrivligar reglur um trygdartiltøk (t.d. í einari trygdarhondbók). | | | | |
| Hava starvsfólkini: | | | | |
| • atgongd heimanífrá til stovnsnetið, og | | | | |
| • eru reglur fyri nýtsluni heimanífrá. | | | | |
| Hevur leiðslan gjørt eina váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtsluni. | | | | |
| Hevur leiðslan orðað ein trygdarpolitikk. | | | | |

| 4 Lønarumsiting | Ja | Nei | Ó | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Hevur leiðslan skrivliga mannagongd um: | | | | |
| • at seta fólk í starv, loysa fólk úr starvi, áseta lønarflokk, flyta í hægri lønarflokk, geva lønarískoyti o.t., | | | | |
| • at áleggja yvirtíðararbeiði/ meirarbeiði og tænastuferðir, | | | | |
| • at góðkenna, at lønarútgjaldingarnar eru rættar, | | | | |
| • hvør setir fólk í starv, hvat skjalatilfar verður kravt (umsókn, setanarbræv o.a.). | | | | |
| Hevur leiðslan skrivliga lýsing av dagligu lønarumsitingini, herímillum hvussu arbeiðstíð, frítíð, avspáking, sjúka o.a. verður skrásett. | | | | |
| Við støði í lønarútreiðslunum í mars mánaði 2007 vegna hesi starvsfólk (íroknað eftirlønar- og arbeiðsmarknaðargjøld):<br><br>1. A kr<br>2. B -<br>3. C -<br>4. D -<br>5. E -<br><br>verður leiðslan biðin um at finna fram skjalprógv, sum kunnu sanna, at: | | | | |
| • rættir lønarsatsir eru nýttir (avrit av setanarskrivi), | | | | |
| • lønarútgjaldingarnar samsvara við hóskandi tíðarskráseting, | | | | |
| • tíðarskrásetingin verður váttað av persóni við heimild, | | | | |
| • talið av lønartímum er rætt, | | | | |
| • lønartímarnir eru rætt bólkaðir, t.d. í vanligar tímar, yvirtímar o.a, | | | | |
| • pensjónsinngjaldingarnar eru rættar, | | | | |
| • allir fríir ágóðar eru fráboðaðir Toll- og Skattstovu Føroya. | | | | |

| 5 Vandi fyri mistøkum og sviki | Ja | Nei | Ó | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard, skal grannskoðanin spyrja, um leiðslan hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri seg av mistøkum ella sviki. | | | | |
| Hevur leiðslan nýtt eina ávísa mannagongd at finna fram til vandarnar fyri sviki. | | | | |
| Hevur leiðslan sett í verk tiltøk at forða fyri sviki. | | | | |
| Hevur leiðslan havt samskifti við starvsfólkini um, hvat hon heldur vera sømiligan og rættan atburð. | | | | |
| Hevur leiðslan: | | | | |
| • kunnleika um, at svik er framt, | | | | |
| • illgruna um svik, | | | | |
| • hoyrt um skuldsetingar um svik. | | | | |
| **6 Annað** | | | | |
| Hevur leiðslan eina skrivliga mannagongd, ið tryggjar: | | | | |
| • bíligar vørur og tænastur (útboð/kapping millum veitarar), | | | | |
| • at latnar vørur/tænastur í nøgd, góðsku og prísi svara til tað, sum er avtalað, og at útreiðslan er rætt roknað. | | | | |
| Hevur stovnurin leigað/leasað arbeiðstól ella høli. | | | | |
| Hevur stovnurin inntøkur: | | | | |
| • um ja, hevur stovnurin eina skrivliga mannagongd, sum lýsir heimild, skráseting, prísáseting, avsláttir og kredittir. | | | | |
| Hevur stovnurin eina mannagongd, sum tryggjar, at allar inntøkur, sum eiga at verða skrásettar, verða skrásettar. | | | | |
| Um stovnurin rindar studning: | | | | |
| • verður studningurin skrásettur, so tað ber til at meta um, hvørt úrslitið svarar til endamál og fyritreytir fyri játtanini, | | | | |
| • eru reglur fyri, hvussu og nær studningur kann verða goldin út, | | | | |
| • eru reglur fyri málsviðgerðini. | | | | |